*– Eitt er vist, at sjálvt um byrjanin hevur verið trupul, so hava vit eitt spennandi landslið fyri framman*

*Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari í fótbólti*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# ÍTRÓTTUR

# – Landsliðið má fáa frið at mennast

**- Nýggir spælarar í landsliðshópinum skulu átaka sær uppgávuna sum leiðarar á vøllinum.Tað er ein stór avbjóðing fyri teir, og neyðugt er at teir fáa tíð og frið til at broyta sín leiklut, sigur Jógvan Martin Olsen. Hann heldur, at landsliðið er mannað við røttu spælarunum, og at fólk mugu geva liðnum møguleika at menna seg**

LANDSLIÐIÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Føroyska fótbóltslandsliðið hevur rættiliga verið í brennideplinum seinastu vikurnar. Tvey lemjandi tap í fyrstu dystunum í nýggju EM-kappingini, hava fingið fólk at ressast. Fyrrverandi spælarar, núverandi venjarar og onnur krevja broytingar á liðnum, og fleiri av mælt til, at landsliðsvenjarin fer úr starvinum.

Men tað seinasta kemur als ikki upp á tal, tí tá ið Jógvan Martin Olsen verður spurdur, um hann hevur umhugsað at leggja frá sær, er svarið stutt og greitt:

– Nei.

Hann viðurkennir tó, at landsliðið hevur trupulleikar, og at nakað skal gerast við at betra um avrikini á vøllinum.

– Tað eru fleiri orsøkir til, hví tað hevur gingið so illa í seinastu dystunum, men vit eru á einum byrjanarstigi í arbeiðnum við einum nýggjum landsliðið, og vit síggja stórar møguleikar í hesum liðnum. Vit skulu bara halda fram við arbeiðnum, sigur Jógvan Martin Olsen.



*– Tað eru fleiri orsøkir til, hví tað hevur gingið so illa í seinastu dystunum, men vit eru á einum byrjanarstigi í arbeiðnum við einum nýggjum landsliðið, og vit síggja stórar møguleikar í hesum liðnum, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Verjuspælið vánaligt

Landsliðsvenjarin heldur, at føroyska landsliðið hevur stórar trupulleikar við verjuspælinum í løtuni, og tað sást eisini aftur í dystinum í Skotlandi.

– Størsti trupulleikin hjá okkum í løtuni er verjuspælið. Mótstøðuliðini skora alt ov lætt mál ímóti okkum í støðum, har liðið hjá okkum er í javnvág og enntá í yvirtalsstøðu. Í hesum báðum dystunum eru fýra mál komin ímóti okkum, har vit verja við sjey spælarum ímóti trimum og sjey ímóti fýra, og tá slíkt hendur, er tað torført at hava við at gera, sigur Jógvan Martin Olsen.

– Londini, sum vit nú spæla ímóti, er eisini nógv betur fyrireikað til at spæla ímóti okkum, enn tey plagdu at vera. Úrslitini, sum Føroyar hava fingið móti Skotlandi, Fraklandi og Týsklandi, hava havt við sær, at londini brúka meiri tíð uppá at hyggja eftir hvussu vit spæla og fyrireika seg til dystirnar ímóti okkum.

### Nýggir leiðarar

Jógvan Martin Olsen vísir á, at fleiri av royndu spælarunum á landsliðnum eru givnir, og seinastu fýra árini eru fleiri av stuðulsspælarunum á landsliðnum farnir burtur av. Hetta ger, at yngri spælarar skulu átaka sær nýggjar uppgávur á liðnum, og tað tekur tíð.

– Leikluturin hjá nógvum leikarum í hópinum er broyttur. Frá at verða ein av teimum nógvu, sum kanska ikki hugsa so nógv um annað enn um sín egna leiklut, skulu nakrir taka ein nýggjan leiklut á seg sum leiðarar í hópinum. Hetta er ein stór avbjóðing fyri hesar leikarar, men hetta er sera tydningarmikið og neyðugt stig hjá liðnum og spælrunum at taka, og eg fari inniliga heita á øll um at lata hesar leikarar fáa frið og tíð at finna henda nýggja leiklut, sigur Jógvan Martin Olsen.

– Eitt er vist, at sjálvt um byrjanin hevur verið trupul, so hava vit eitt spennandi landslið fyri framman, men teir mugu fáa frið at mennast, sjálvt um úrslitini ikki skuldu laga seg.

### Hava fatur í røttu spælarunum

Nógv verður altíð tosa um spælararnar, sum manna landsliðið, og her hava fólk nógvar meiningar. Summi halda, at aðrir spælarar skulu verið tiknir út, tí summar av teimum, sum eru á landsliðnum, eru ikki nóg góðir.

– Tú kanst altíð kjakast um tveir ella tríggjar spælarar í sambandi við hvørja úttøku, og tað gera vit jú eisini. Vit eru eisini í teirri støðu, at vit eru eitt sindur leitandi á nøkrum plássum, men at vit hava fatur á teimum røttu leikarunum, ivist eg ikki eina løtu í, sigur landsliðsvenjarin.

– Vit síggja, at tað tekniska støðið í hópinum er nógv hægri, enn tað nakratíð hevur verið, men vit síggja eisini at umgangstónin í hópinum er kanska ein tóna penari, enn hann var fyri tíð síðani. Tá høvdu vit fleiri spælarar við nógvum royndum og sum spældu í feløgum uttanlands. Hetta er ein prosess vit skulu ígjøgnum, men tað kemur so líðandi saman við royndunum, sum spælararnir fáa.

Jógvan Martin Olsen útilokar ikki, at onkrar broytingar verða gjørdar í úttøkuni til næsta landsdystin.

– Nú fáa vit at síggja, hvussu tað verður, men onkur sjálvsøgd broyting verður av teirri orsøk, at Óli Johannesen er leikbannaður til dystin móti Litava, sigur hann.

# Nú sleppur HB at royna seg

**Drúgva kærumálið um Páll Mohr Joensen er av, og mikukvøldið spælir HB aftur í steypakappingini. HB manglar verjuspælara, og álopsspælari hjá EB/Streymi er ikki tøkur**

EB/STREYMUR-HB
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í annaðkvøld verður seinasta fjórðingsfinalan í kappingini um Løgmanssteypið spæld. Dysturin hevur bíðað í fleiri mánaðir orsaka av drúgva kærumálinum um spæliloyvið hjá Páll Mohr Joensen.

HB hevur fleiri ferðir verið dømt at tapa dystin ímóti VB/Sumba, men seinasti og endaligi dómurin gjørdist, at HB fekk bót og misti heimavølli, men sleppur at halda fram í steypakappingini.

Í kvøld sleppur HB so at royna seg aftur, og dysturin ímóti EB/Streymi verður spældur á Eiði kl. 18.00.

Hjá oddaliðnum EB/Streymi, sum hevur beina kós ímóti FM-gullinum, stendur væl til við fólki. Jørgen Meitelberg, sum hevur verið við síðani summarsteðgin, er skaddur og kann ikki spæla. Allir hinir spælararnir eru tøkir.

Hjá HB manglar verjuspælarin Vagnur Mohr Mortensen, sum varð útvístur í landskappingardystinum ímóti NSÍ. Vagnur hevur fingið tveir dagar leikbann, og tí kann hann ikki spæla við í annaðkvøld.

## GÍ-kvinnur vunnu á Argjum

Bara annar av dystunum í FM-bólkinum hjá kvinnum varð spældur um vikuskiftið. Tað var dysturin millum AB og GÍ, sum varð spældur á Argjum. Hin dysturin skuldi verða millum EB/Streym og KÍ á Eiði, men dysturin var útsettur orsaka av jarðarferð. Hann verður tí spældur seinni.

GÍ kláraði seinasta vikuskiftið at taka fyrstu stigini frá føroyameistarunum KÍ, og sunnudagin vann GÍ trupla útidystin á Argjum. Dysturin var tættur og spennandi, men tað var GÍ, sum at enda hevði munin. Einasta málið í dystinum kom longu eftir 9 minuttir, og tað var Ninna K. Johansen, sum skoraði málið.

Við sigrinum togaði GÍ seg fram á næstfremsta plássið við 17 stigum. AB hevur 16 stig. Væl frammanfyri liggur tí KÍ, sum hevur 22 stig og ein dystir til góðar.

## HB-kvinnur nýggjan venjara

Kvinnuliðið hjá HB hevur fingið nýggjan venjara í summarsteðginum. Andras K. Thomassen er farin av landinum í lestrarørindum, og nýggjur venjari er klaksvíkingurin Odd Færø, sum hevur drúgvar royndir sum venjari hjá ymsum gentuliðum hjá KÍ seinastu árini. Odd venur eisini gentuliðið hjá HB. Heimasíðan hjá HB skrivar, at Odd arbeiðir longu hart við hugburðinum hjá HB-kvinnunum í royndini at venda keðiligu gongdini, sum ávirkar fleiri av gentunum meira enn gott er. Odd er komin væl í gongd og hevur stórar ætlanir fyri liðið, sum hann fegin vil venja komandi ár eisini.